UMHVØRVIS- OG VINNUMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn
Føroyar

Tórshavn, tann 7. apríl 2022
J.nr.: 22/07235-2
At tilskila í svari

Svar upp á § 52a-fyrispurning nr. 52-163/2021 frá Beintu Løwe Jacobsen, løgtingsmanni, um matvørutrygd

Spurningarnir vóru soljóðandi:

1. *Hvat verður gjørt við matvørutrygd í Føroyum, nú kríggj er í Ukraina, og matvøruprísir hækka?*
2. *Hvat samskifti hevur verið millum landsstýrið og føroyska landbúnaðin fyri at tryggja nóg mikið av matvøru í Føroyum?*
3. *Hvørjar ætlanir eru um at menna føroyska landbúnaðin, so bøndur kunnu fara at framleiða uppaftur fleiri matvørur til føroyska marknaðin?*

Til nr. 1:
Málið um matvørutrygd í Føroyum í sambandi við kríggið í Ukraina hevur verið viðgjørt í Kreppuráðnum. Við støði í teimum upplýsingum, sum eru tøkar beint nú, verður mett, at veitingarkervið og -trygdin eru í lagi, og at vit yvirhøvur fáa fatur á teimum matvørum, sum tørvur er á í Føroyum.

Prísurin á matvørum er hækkaður kring allan heim, og tað merkist eisini her hjá okkum. Hetta kann gerast ein tyngjandi útreiðsla hjá summum, men í løtuni er eingin ætlan um at taka nøkur stig hesum viðvíkjandi.

Fylgt verður kortini væl við bæði matvørutrygdini og veitingarkervinum og -trygdini, og málið verður tikið upp aftur til viðgerðar, um tað verður neyðugt.

Til nr. 2-3:
Í Føroyum eru vit í teirri hepnu støðu, at vit eru ein matvøruframleiðandi tjóð.

Vit hava góða atgongd til matvørur úr sjónum, og tað er eisini fyrst og fremst sjógvurin, sum er okkara kovi. Tí er tað sjógvurin, sum verður álitið, um tað fer at sansa at við matvørum, men eg beri ongan ótta fyri, at vit fara at koma í ta støðu, at okkum fer at tróta mat. Í hesum sambandi er eisini umráðandi at hava í huga, at so leingi fólk halda fram at keypa á vanligan hátt uttan at leggja inn undir seg, er nóg mikið til øll.

Landbúnaðarframleiðslan er sjálvsagt eisini ein týðandi partur, tá ið ræður um at framleiða egnar matvørur, men henda framleiðslan er ikki nóg stór til, at vit kunnu seta alt álit á hana. Vit eiga at fáa sum mest burtur úr tí tilfeingi, sum vit hava – eisini á landbúnaðarøkinum – men

hesar broytingar og tillagingar taka langa tíð. Í løtuni er støðan kortini tann, at vit enn sum áður í stóran mun mugu dúva upp á innfluttar landbúnaðarvørur.

Landbúnaðarpolitikkurin, sum sjøtul er settur á, fer at eggja vinnuni til at vaksa um landbúnaðarframleiðsluna á ymsum økjum, og eg vænti, at hetta í framtíðini fer at gerast eitt gott ískoyti til ætlanina um at fáa sum mest burtur úr egnum tilfeingi, bæði á sjógvi og landi.

Umhvørvis- og vinnumálaráðið, 7. apríl 2022

Magnus Rasmussen
landsstýrismaður